


## KOMANDI TILTØK

**2. november** koma flest øll sendifólkini í Íslandi til kunningarfund í Sendistovuni í sambandi við fyrireikingar til Føroya ferðina í mai næsta ár

**8. november,** um kvøldið, bjóðar amerikanski sendiharrin til "*2016 U.S. Presidential Election Results Viewing Party*"

**10. november** luttekur Sendistovan í Altjóða døgunum hjá Háskóla Íslands vegna Fróðskaparsetur Føroya (greiða frá útbúgvingarmøguleikunum í Føroyum)

**14. – 21. november** kemur føroysk fyritøka at gera nýtslu av hýsingarskipanini hjá Sendistovuni. Fyritøkan kemur at arbeiða út frá Sendistovuni, fyri at finna fram til møguligar kundar, ið kunnu selja/umboða fyritøkuna á íslendska marknaðinum

## ALTINGSVALIÐ 29. OKTOBER.

Altingsvalið gjørdist ein dyggur smeitur fyri flokkin hjá verandi forsætisráðharra Sigurður Ingi Jóhannsson – Framsóknarflokkinum, sum misti 11 altingslimir. Flest øll eru á einum máli um, at Panama skjølini gjørdu sítt til, at flokkurin misti so nógv. Í apríl mánaða í ár, noyddist táverandi forsætisráðharrin, Sigmundur Davíð Gunnlaugsson, frá, orsakað av hansara leikluti í Panama skjølunum.

> *» Hóast nýggjur flokkur varð stovnaður – Viðreisn ("Endurreisn") – sum sprettur úr Sjálfstæðisflokkinum, so fekk Sjálfstæðisflokkurin tveir altingslimir afturat og Viðreisn fekk 7 altingslimir. Sostatt fingu hesir báðir flokkarnir 9 altingslimir fleiri og 39,5 % av atkvøðunum. Mett verður, at hesir báðir flokkarnir hava fingið bróðurpartin av teimum atkvøðum, sum Framsóknarflokkurin misti.«*

Stutt undan valinum, fundaðust fýra andstøðuflokkarnir - Vinstrihreyfingin - grænt framboð, Píratar, Björt framtíð og Samfylkingin – sum sambært meiningarkanningunum stóðu til at fáa ein rímiligan stóran meiriluta. Men tá ið valúrslitið upprann, var hesin meiriluti ikki longur til staðar. Hví so varð, er ikki so einfalt at meta um, men tað er óvanligt í Íslandi at ganga saman á slíkan hátt undan vali, og kanska veljararnir ikki ynsktu hesa stjórn. Serliga vóru tað Píratarnir, sum ikki fingu ta undirtøku, ið veljarakanningarnar høvdu spátt um.

Samfylkingin fekk eitt vánaligt val. Flokkurin misti 6 altingslimir og hevur nú bert 3 og er minsti flokkur, sum er komin inn í Altingið á hesum sinni. Við sínum 5,7% liggur hann tætt við tinggáttina, sum er 5%.

Talið av kvinnum, sum vóru valdar til Altingið hesaferð, vóru 30 í tali av 63 altingslimum ella 48%. Hetta er hægsta talið av kvinnum higartil. Hetta er so tætt at javnstøðu millum kynini, sum næstan til ber at koma. Til seinasta val var talið av kvinnum 25, t.v.s. um 40%.




*Mynd 1. Býtið av altingslimum við valið í 2013 og við valið í 2016.*

Av teimum 63 altingslimunum eru 31, sum fyri fyrstu ferð koma á ting.

Á talvuni til vinstru, sæst úrslitið av valinum, samanborið við undanfarna val. Valluttøkan var 79,2% og er søguliga lág (í 2013 var hon 81,5%). Valluttøkan hesaferð er tann lægsta í søgu lýðveldisins. Gjørligt verður ikki at mynda stjórn við minni enn 3 flokkum. Ikki síðani 1987 hevur ríkisstjórnin haft fleiri enn 2 flokkar.

## STUTT UM POLITISKU FLOKKARNAR Í ÍSLANDI

Niðanfyri er ein stutt lýsing av teimum flokkum, sum komu í Altingið til valið 29. oktober 2016:

**Björt framtíð**: Flokkurin varð stovnaður í 2013, liggur á miðjuni og er sosial liberalur. Hann er fyri ES limaskapi og hevur millum annað tosað um at skifta frá íslendsku krónuni til evruna. Óttar Proppé er formaður, og hevur studentsprógv og er tónleikari.

**Framsóknarflokkurin**: Flokkurin liggur á miðjuni móti høgru, varð stovnaður í 1916 og var og er ein partur av bónda og fiskimanna rørsluni. Vanliga væl dámdur úti á bygd og uttanfyri Reykjavik. Er ES ivandi. Sigurður Ingi Jóhannsson er formaður, og er útbúgvin djóralækni.

**Píratar**: Flokkurin er stovnaður í 2012, hevur ongan kláran vinstra høgra politikk, men gongur inn fyri beinleiðis demokrati, soleiðis at fólkið tekur støðu til stórar avgerðir við fólkaatkvøðum. Vitan skal kunna deilast við øll, er ein grundarhugsjón hjá flokkinum. Birgitta Jónsdóttir er forkvinna, og er sjálvlærd innan kunningartøkni og er ein fjøllistakvinna.

**Samfylkingin**: Flokkurin liggur á miðjuni og út til vinstru, og var stovnaður í ár 2000. Flokkurin er fyri ES limaskapi og kallar seg eisini feministiskan. Hann hevði fyrsta kvinnuliga forsætisráðharran, og er sosial demokratiskur. Oddný G. Harðardóttir er forkvinna, og er útbúgvin lærari.

**Sjálfstæðisflokkurinn**: Flokkurin liggur á mið- høgraveinginum, og er ein av teimum elstu flokkunum, stovnaður í 1929. Hann er liberal konservativur, fíggjarliga liberalur og ímóti ES limaskapi. Savnar vanliga veljarar frá øllum høgra veinginum. Bjarni Benediktsson er formaður, og er útbúgvin løgfrøðingur.

**Viðreisn**: Flokkurin varð stovnaður í 2016. Sosialistiskur og reformistiskur, og liggur á høgru miðjuni. Varð stovnaður av ónøgdum fólki úr Sjálfsæðisflokkinum. Fyri ES limaskapi gjøgnum fólkaatkvøðu. Benedikt Jóhanneson er formaður, og er útbúgvin doktari í hagfrøði og støddfrøði.

**Vinstrihreyfingin – Grænt framboð**: Flokkurin liggur út til vinstru og varð stovnaður í 2000, av fólki, ið vóru ónøgd við skránna hjá Samfylkingini. Hann er friðarsinnaður, javnaðarsinnaður og feministiskur. Flokkurin er ímóti ES limaskapi. Sum navnið vísir, er flokkurin eisini umhvørvissinnaður. Katrín Jakobsdóttir er forkvinna, og er útbúgvin í íslendskum og íslendskum bókmentum.

## POLITISKA STØÐAN EFTIR VALIÐ

Eftir fyrsta floksformansumfarið hjá forsetanum, 31. oktober, var støðan ógreið, tí 3 floksformenn ynsktu at standa á odda fyri samgongusamráðingunum. Formaður Sjálfstæðisflokksins – Bjarni Benediktsson – vísti á seg sjálvan. Formaðurin fyri

Framsóknarflokkin - Sigurður Ingi Jóhannsson – vísti somuleiðis á formann Sjálfstæðisflokkin, sum samráðingarleiðara.



*Mynd 2. Floksformenninir í teimum 7 flokkunum, sum eru komnir í Altingið við valið í 2016.*

Formaðurin hjá Vinstrihreyfingin – Grænt framboð, Katrín Jakobsdóttir, segði seg vera tilreiðar at leiða samráðingarnar við eini 5 flokka stjórn, við teimum 4 andstøðuflokkunum og Viðreisn. Hinvegin, so vísti formaðurin fyri Viðreisn á seg sjálvan, og formaðurin fyri Bjarta Framtíð - Óttar Proppé – vísti eisini á formannin fyri Viðreisn, sum samráðingarleiðara.

Píratarnir vístu á eina minnilutastjórn við Vinstrihreyfingin – Grænt framboð, Viðreisn og Björt framtíð og segði seg vilja vera til reiðar at stuðla henni. Fráfarandi formaðurin fyri Samfylkingina - Oddný G. Harðardóttir, sum hevði valt at lagt frá sær eftir fund í floksleiðsluni fyrr um dagin og boðaði frá, at næstformaðurin, Logi Einarsson, tekur við sum formaður – vildi stuðla eina minnilutasamgongu og at flokkurin neyvan fór at gerast partur av einari samgongu.

Forsetin fer í dag (1. november) at røða nærri við floksformenninar um støðuna. Síðani er tað upp til forsetan at meta um, hvønn hann heldur er best førur fyri at skipa stjórn. Forsetin letur síðani hesum persóni í hendurnar, at skipa stjórn.

## LØNIN HJÁ TINGFÓLKUM O.Ø. HÆKKAR.



*Mynd 3. Altingið.*

Tingmenn kunnu í mesta lagi fáa góðar 2 mió. ISK í løn um mánaðin, eftir at íslendska lønarnevndin hækkaði lønina hjá fólkavaldum, tann 31. oktober. Lønin fer upp í 1.1 mió. ISK um mánaðin, og viðbøtur kunnu tvífalda upphæddina. Hendan lønarhækking er onnur hækking, sum fólkavald umboð hava fingið í ár, fyrra lønarhækkingin var í juni. Tingmannalønin er tí hækkað við góðum 400.000 ISK síðani í juni í ár. Ráðharralønin er hækkað við góðum 570.000 ISK, og forsetalønin er hækkað við 630.000 ISK. Hetta er tó ikki einasta hækking.

Sambært reglum hjá Altinginum, eru fleiri ískoyti løgd oman á lønina. Hvør tinglimur hevur rætt til endurgjald fyri ferðing og starvsútreiðslur fyri tilsamans 174.000 ISK um mánaðin, líkamikið hvussu høgar ella lágar útreiðslurnar eru. Tingmenn, sum valdir eru úti um landið, hava eisini rætt til endurgjald fyri húsarhaldsútreiðslum, og kunnu tær vera millum 45.000 og upp í 188.000 ISK.

Tingfólk fáa eisini viðbøtur fyri ymisk arbeiði í Altinginum. Viðbøturnar eru prosent partar av lønini, og hækka tí í takt við lønina. Hesar viðbøtur fáa tingfólk, sum eru formenn fyri tinginum, formaður og varaformaður fyri nevndum, og formenn fyri politisku flokkunum. Tilsamans eru tað 53 av 63 tingmonnum, sum hava fingið hesar viðbøtur. Sostatt kunnu tingmenn fáa millum 1.3 – 2 mió. ISK um mánaðin. Tað er 78.174 – 120.268 DKK.

Niðanfyri sæst, hvat grundlønin er (í ISK):

| | 1. juni 16 | 1. nov16 | Hækking í ISK | Hækking |
|---|---|---|---|---|
| **Altingslimir** | 762.940 | 1.101.194 (66.219 DKK) | 338.254 | 44,3% |
| **Ráðharrar** | 1.347.330 | 1.826.273 (109,821 DKK) | 478.943 | 35,5% |
| **Forsætisráðharri** | 1.490.813 | 2.021.825 (121.580 DKK) | 531.012 | 35,6% |
| **Forseti Íslands** | 2.480.341 | 2.985.000 (179.500 DKK) | 504.659 | 20,4% |

*Sí meira her (á íslendskum)*

## KJARARÁÐ/LØNARNEVND

Kjararáð/Lønarnevnd er ein óheft nevnd, ið hevur fingið ta uppgávu, at áseta lønar- og starvskor hjá ovasta embætisfólki landsins. Í hesum bólki eru m.a. altingslimir, ráðharrar, forsætisráðharri og forseti. Lønarnevndin ásetir eisini lønarkorini hjá stjórum í partafeløgum og øðrum feløgum, ið hava við einarætt at gera, sum landið eigur meirilutan í. Eisini í feløgum, ið áðurnevndu feløg eiga merilutan í. Nærri er greitt frá um starvsemina hjá nevndini í lógini um kjararáð, sí omanfyri.

Lønarnevndin er samansett av fimm nevndarlimum og eins mongum varalimum. Altingið velur tríggjar nevndarlimir. Hægstirættur velur ein og ráðharrin, ið umsitur starvsfólkamál landsins, annan. Hesi somu velja varalimirnar. Limirnir verða settir í fýra ár í senn. Lønarnevndin velur sær formann og varaformann og setur sjálv starvsreglurnar.

*Sí meira her (Kjararáðið) (á íslendskum)*

## VITJAN AV F15R, MIÐNÁM Á KAMBSDALI



*Mynd 4. Sendimaðurin greiðir miðnámsskúlanæmingum frá íslendskum viðurskiftum.*

3. oktober í ár, hevði Sendistovan vitjan av einum HF flokki, F15R, úr Kambsdali. Tey vóru á námsferð í Íslandi, og vóru í tí sambandi inni á sendistovuni, har sendimaðurin Petur Petersen greiddi frá um íslendsk viðurskifti. Aftaná at sendimaðurin hevði greitt frá um íslendska samfelagið og búskaparviðurskifti, við serligum atliti at ferðavinnu, var eitt langt og áhugavert kjak við næmingarnar, har kjakast varð um føroyska ferðavinnu.

## ARCTIC CIRCLE



*Mynd 5. Løgmaður Aksel V. Johannesen á røðarapallinum á Arctic Circle.*

Í ár var Arctic Circle ráðstevnan frá 7. – 9. oktober. Hetta er ein afturvendandi ráðstevna, ið leggur dent á arktiska økið. Umleið 2.000 luttakarar vóru við í ár úr 50 ymiskum londum, og hópurin er ein blanding av stjórnarleiðarum, ráðharrum, tinglimum, embætisfólki, serfrøðingum, granskarum, handilsfólki, lesandi og øðrum, ið øll hava áhuga í arktiska økinum. Ráðstevnan er størsta netverkið av altjóða samrøðum um framtíðina hjá Arktis.

Í ár vóru m.a. Magni Arge og Sjúrður Skaale við, umboðandi Føroyar, saman við grønlendsku fólkatingslimunum, og høvdu eitt panel kjak um Arktis við heitinum "The Arctic: Investment Potential or Sanctuary". Føroya Løgmaður, Aksel V. Johannesen helt røðu um "Faroe Islands: Vision of the Arctic". NORA skipaði eisini fyri tveimum tiltøkum, eins og Jóannes V. Hansen úr Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum luttók í einum tiltaki hjá NAMMCO. Alt í alt ein væleyndað ráðstevna við góðari luttøku úr Føroyum, og tey føroysku tiltøkini vóru væl vitjað og eydnaðust væl.

*Sí meira her (á enskum)*

## VESTNORDEN TRAVEL MART 2016 Í REYKJAVÍK



*Mynd 6. Vestnorden Travel Mart 2016 í Laugardalshøllini í Reykjavík.*

6. oktober vitjaði sendimaðurin, saman við Rógva Petursson, starvslesandi, Vestnorden Travel Mart, har umboð fyri fyritøkur í Grønlandi, Íslandi og Føroyum, fáa høvi at hittast og gera avtalur um at arbeiða saman, ein sokallað B2B (business to business) ráðstevna. Her greiddu føroysku fyritøkurnar m.a. frá, at fleiri íslendskar fyritøkur royna at fáa samband við føroyskar fyritøkur, so at tey kunnu flyta nøkur av mongu ferðafólkunum úr Íslandi til Føroyar. Hetta, tí at Ísland er við at verða mettað av ferðafólki. Sendimaðurin hitti umboð frá fleiri spennandi fyritøkum, og fekk høvi at læra nógv um ferðavinnuna í norður Atlantshavi. Hugaligt var at síggja, hvussu væl føroyska ferðavinnan var umboðað og hvussu góður samstarvsandin var millum fyritøkurnar, hóast flestu teirra eru kappingarneytar. 14 fyritøkur úr Føroyum tóku lut.

## FØROYA HANDVERKSMEISTARAFELAG Á VITJAN



*Mynd 7. Nevndin í Føroya Handverksmeistarafelag vitjar Sendistovuna*

21. oktober, vitjaði nevndin fyri Føroya Handverksmeistarafelag Sendistovuna. Nevndin hevði biðið sendimannin greitt frá íslendskum samfelagsviðurskiftum og virksemi í byggivinnuni. Eisini hevði nevndin heitt á sendimannin um at greiða frá, hvussu ein skuldi borið seg at, um ynskiligt hevði verið, at gjørt seg galdandi á íslendska byggimarknaðinum. Nógvir spurningar vóru og kjakast varð dúgliga um íslendsk og føroysk viðurskifti í byggivinnuni og um útbúgvingarkrøv í Íslandi og Føroyum.


**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook